# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Fyri 55 árum síðan:

## Realskúlagentur

Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007.

Myndin er tikin uutan fyri Realskúlan í 1954 av trimum næmingum, tær eru f.v.: Sanna Joensen (Kelduberg), Tóra Jacobsen (Friisdal) og Hjørdis Poulsen.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (mynd nr. 436).

*Myndaeigari: Tóra Friisdal*



*Sanna Joensen, Tóra Jacobsen og Hjørdis Poulsen*

Fyri 25 árum síðan:

## Sløkkið 1. apríl!






*Landsstýrismaðurin gav sjónvarpsfeløgunum boð um at sløkkja 1. apríl 1984. Her sæst Torbein Rein í fyrstu sjónvarpshølunum á B74 á Landssjúkrahúsinum*



*Eftir 1. apríl skuldi Sjónvarp Føroya taka yvir við nýggjari útgerð*

**Tíðindablaðið Sosialinum skrivar tann 24. mars 1984 at sjónvarpsfeløgini hava fingið boð um at sløkkja 1. apríl**

Sunnudagin 1. apríl er seinasti dagur sjónvarpsfeløgini sleppa at senda. Landsstýrið hevur givið feløgunum boð um at tey skulu gevast hendan dagin, sigur Torbjørn Poulsen, landsstýrismaður. Sjónvarpsfeløg eru í Havn, Klaksvík, Vestmanna, Vági, Sandoy, Eysturoy, Tvøroyri og á Eiði.

Feløgini fingu sendiloyvi við teirri treyt, at tey góvust so skjótt almenna sjónvarpið kom.

Landsstýrið hevur boðað feløgunum frá, at um tey hava útgerð sum Sjónvarp Føroya kann nýta, er Televerkið sinnað at yvirtaka hana.

Torbjørn Poulsen sigur, at sær vitandi er eingin umsókn komin frá nøkrum sjónvarpsfelag um at sleppa at halda fram eftir 1. apríl.

Undir yvirskriftini "Føroyingar í kjalarvørri Odysseus" skrivar blaðið eisini um Trónd Patursson í Kirkjubø, sum við einum báti sum griksku sjófararnir brúktu 1300-1400 fyri Krist, fer hann á eina rannsóknarferð inn í Svartahavið.

Blaðið skrivar eisini at svínoyingar gera klárt til drotningavitjan, sum verður í bygdini 13. mai, tá Margretha drotning og Heindrikur prinsur koma á vitjan.

*mg*

**Dagurin**
**24. mars. Ulrika.** Teir vita ikki, hvønn hetta halginavnið sipar til. Týska navnið Ulrikus kemur av uodal, ið er sama orð sum óðal, rikus merkir eyður. Jørgen-Frantz Jacobsen doyði hendan dagin í 1938.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

†

### Andlát og jarðarferðir

**Tordis Huus Nilsen**, ættað úr Syðrugøtu, búsitandi á Argjum, andaðist á Tjarnargarði leygardagin, 62 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Argja Kirkju týsdagin kl. 12. Tey, ið vilja minnast Tordis, kunnu lata Gøtu Kirkju eina gávu, konta í peningastovnunum.

**Petra Samuelsen, Tórshavn** andaðist á Landssjúkahúsinum sunnudagin, 97 ára gomul. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Dómkirkjuni hósdagin kl. 14.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu,
tá okkara høgt elskaða kona, mamma, vermóðir,
omma og langomma

**Ingvør Andreasen**
fødd Nolsøe
Tvøroyri

andaðist og varð jarðað.
Takk til Jónsvein Bech fyri góð og troystarrík orð í kapelli og kirkjuni. Takk til kirkjutænarar, sangarar, berarar, gravara og til tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Takk til tykkum á Suðuroyar Sjúkrahúsi, sum vóru um hana har.
Takk fyri blómur, kransar og uppringingar og til tykkum, sum fylgdu Ingvør til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Pole, Arni og Johenny**

**Gullbrúdleyp**
5. apríl hava Emma og Harry Hansen, Toftir, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin á Svangaskarði leygardagin 4. apríl kl 19.00. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu tekna seg á telefon 447590 ella 251982 innan 29. mars.

**Gullbrúdleyp**
29. apríl 2009 hava Solveig og Jens Peter Arge, Tórshavn, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin á Hotel Føroyum leygardagin 2. mai kl. 19.00. Um tit ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu tit boða okkum frá á tlf. 313173 ella 213171 innan 20. apríl 2009.

**Brúdleyp**
25. apríl 2009 kl. 12 giftast í Betesda, Klaksvík: Elsebeth P. Eyðunsdóttir Jacobsen, Svínoy og Marni Steinberg, Klaksvík. Veitslan verður á hotel Norð kl. 16. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu tekna seg á tlf. 226916 (Elsebeth) ella tlf. 220061/ 287307 (Marni) innan 31. mars 2009.

**Brúdleyp**
8. apríl giftast í Keypmannahavn Stine Dobak Jensen, Oslo, ogTummas Planck Reinert, Tórshavn. Adressan er Øresundsvej 92, 2 th., 2300 København S.